SKYN



# Sethús

## Tjarnardeild 15, Tórshavn



| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 229 | 484 | 3 | 4 | 1974 |

Sera íheimlig og snotilig sethús, sum standa væl fyri í serstakliga hugnaligum, friðarligum og barnavinarligum umhvørvi. Húsini eru tætt við Hoyvíkstjørn og stutt er oman í miðbýin, skúla, stovnar o.a.

Húsini eru í trimum hæddum. Í ovastu hæddini er trappugongd / alrúm / loftsstova / té-køkur,
tvey kømur og goymslurúm. Í miðhæddini er durur, hjallur, vesi, gongd, køkur, stova baðirúm, klædnarúm og tvey kømur. Í niðastu hæddini er trappugongd / gongd, trý kjallararúm, hjallur og krúpikjallari.

Runt húsið er snøggur garður, grasfløta, runnar og túnið er lagt við flísum. Pláss er fyri einum bili í túninum.

## Prísuppskot 4.375.000,-

Dømi um fígging: Afturgjaldstíðin er 25 ár

| | |
|---|---|
| Útgjald, 10% | **437.500 kr.** |
| Mðr. gjald – áðrenn rentustuðul | **17.805 kr.** |
| Mðr. gjald – eftir rentustuðul | **14.647 kr.** |

Útrokningin er vegleiðandi. Eitt nú er hædd ikki tikin fyri stovningarprovisión, tinglýsing og øðrum kostnaði. Rentustuðul verður bert veittur til egnan bústað.
Rentan er 2,95% upp til 80% av virðinum og fyri síðstu 10% er rentan 4,75%.

# Innanhýsis lýsing av ognini

| Bústaður á ogn | Tjarnradeild 15, Tórshavn | Matrikkul nr. | 682p Tórshavn |
|---|---|---|---|

## Kortalmynd



# Lýsing 1

| | |
|---|---|
| Fyriliggur húsaskoðan og seljarans upplýsingar | Ja |
| Bjóðar seljari eigaraskiftistrygging galdandi í 5 ár | Ja |

| | |
|---|---|
| Slag | Sethús |
| Matrikkul | 682p, Tórshavn |
| Grundøki stødd | 484m$^2$ |
| Uttandura mát av ognini | 229,5m$^2$ |
| Byggiár | 1974 |
| Hæddir | 3 |

| | |
|---|---|
| Tekningar | Ja |
| Stoppikrani | Í kjallarar og uttanfyri |
| El-mátari 1 | Á loftinum |
| Kort | www.kortal.fo |
| Rottangi | Ja |
| Atgongd til væðing | Ja |
| Eigari/ar síðan | 1974 |
| Hví selur seljarin? | Flytur í íbúð |
| Er leigari í ognini? | Nei |
| Nær kann yvirtøkudagur væntast at vera umleið? | Umleið hálvan august 2021 ella eftir nærri avtalu |
| Verður ognin vaskað og ruddað áðrenn yvirtøkuna? | Ja |

# Umsiting

| | |
|---|---|
| Framdar umvælingar | Køkur skiftur í 2006, vindeygu skift í 2008, lítil hjallur gjørdur í miðhæddini í 2012 og baðirúmið gjørt av nýggjum í 2013 |
| Møguligar umvælingar | Sí húsaskoðan og seljarans upplýsingar |
| Viðlíkahald | Sí húsaskoðan og seljarans upplýsingar |

# Innrætting

| | | |
|---|---|---|
| Ovasta hædd | 50 m² | Trappugongd / alrúm / loftsstova, tvey kømur og goymslurúm |
| Miðhædd | 125 m² | Durur, hjallur, gongd, trappugongd, trappugongd, vesi, køkur, stova, baðirúm, klædnarúm og tvey kømur |
| Niðasta hædd | 55 m² | Trappugongd / gongd, trý kjallararúm, hjallur og krúpikjallari |
| Annað | | Garður / havi runt húsið |
| Umhvørvi | | Friðarligt og barnavinarligt |
| Grannalag | | Gott |
| Parkeringspláss | | Eitt. Møguleiki er at gera tvey |
| Prísuppskot | | 4.375.000,- |

# Lýsing 2

| | |
|---|---|
| Bilhús | Nei |
| Hjallur | Ja, tveir |
| Tilbygningur | Nei |
| Tak | Eternit |
| Tætt tróður | Nei |
| Loft | Ymiskt |
| Gólv – undir | Timbur og betong undir baðirúminum og durinum |
| Álegging | Ymiskt |
| Vindeygu | Plast |
| Termorútar | Ja |
| Úthurðar | Timbur |
| Klædningur | Timbur |
| Bjálving | Sum í 70uunum |
| Innveggir | Timbur, betongveggir í millum kjallararúm |
| Innhurðar | Timbur |
| Trappa/ur | Timbur inni, betong úti |
| Grund | Betong |
| Rør-/hitaskipan | Jarn og kopar |
| Antenna | Ja, felags antennuskipan í økinum |
| Brúsa | Ja |
| Baðikar | Nei |
| Oljufýring | Ja |
| Ketil | Ja |
| Oljutangi | Ja |

| | |
|---|---|
| Fjarhiti | Nei |
| Brenniovnur | Nei |
| Luftskipan | Nei |
| Innbygd skáp | Ja |
| Gólvhiti | Ja, í baðirúminum |
| Køkur | Ja |

| | |
|---|---|
| Telefon | Ja |
| Internet | Ja |

## Við í søluni

| | |
|---|---|
| Ovnur | Ja |
| Roykhetta | Ja |
| Køli/frystiskáp | Ja |
| Frystiboks | Nei til boksina í erva, ja til boksina í kjallaranum |
| Uppvaskimaskina | Ja |
| Vaskimaskina | Ja |
| Turkimaskina | Ja |
| Skrellispann | Ja |
| Postkassi | Ja |

## Bygningur/ar

| | A | B | C |
|---|---|---|---|
| Byggiár | 1974 | | |
| Ovara hædd $m^2$ | 50 $m^2$ | | |
| Miðhædd $m^2$ | 124,9 $m^2$ | | |
| Niðara hædd $m^2$ | 54,6 $m^2$ | | |
| Uttandura mát av ognini $m^2$ | 229,5 $m^2$ | | |

## Útreiðslur

| Rakstrarútreiðslur | Litrar/kwt | Kr./mðr. | Kr./ár |
|---|---|---|---|
| Orku-/oljunýtsla | 2550 l. | | |
| El | | 300-400 kr. | |

# Tikið inn

| Navn: | Dánjal Magnussen/Jobin | Tlf.: | 234400 | Dagfesting: | 21-04-2021 |
|---|---|---|---|---|---|

## Kunning og serligar viðmerkingar um ognina og sølutilfar annars

Upplýsingar í bústaðarlýsingini eru givnar eftir eigarans bestu sannføring. Tað kann ikki væntast, at eigarin hevur nøktandi kunnleika til standin og støðuna, hetta eitt nú innlit í rør-, hvs-, el- og kloakkeringsviðurskifti v.m., og má fyrilit takast fyri hesum, og tískil verður altíð mælt til, at áhugaðir keyparar hava serkøn við sær at sýna og gjøgnumganga ognina, áðrenn tey bjóða upp á ognina.

Um húsaskoðan og seljarans upplýsingar fyriliggja, er sera umráðandi, at áhugaður keypari lesur hesi skjøl gjølla, og kannar nærri viðmerkingarnar í hesum skjølum, serliga tá ið tað er frámerkt við KN, S3, S2 og S1, tí at keyparin í útgangsstøði ikki kann gera galdandi møguligar manglar, sum víst verður á í húsaskoðanini (støðufrágreiðingini), og seljarans upplýsingum.

Hesar viðmerkingar eru soleiðis ein kunning um standin á ognini, men eisini ein ábyrgdarfráskriving frá seljarans síðu, ið ikki er møguligt hjá keypara at koma afturumaftur við, eftir at ein avtala um keyp er gjørd.

Fyriliggur tilboð um eigaraskiftistrygging, er umráðandi, at keypari setir seg inn í rættarvirknaðin av hesum, og fylgjurnar av, um viðkomandi velur ikki at taka av tilboðnum. Rættarvirknaðurin av, at keypari velur ikki at taka av tilboðnum, er, at seljari er stillaður sum um tryggingin er teknað, meðan keypari er uttan deknað, og harvið átekur sær ein umfatandi váða.

Nærri kunning um hetta fæst eisini við at seta seg í samband við Skyn, og mæla vit annars altíð til, at keypari tekur av tilboði um at tekna eigaraskiftistrygging.

Dagfest:

Undirskrivað av seljara: